## tankar um lívið

*Kim Simonsen skrivar*

# Sjálvgloymska

Vit kunnu vera meiri ella minni opin yvir fyri umheiminum. Og blind yvir fyri tí, ið hendir okkara næsta. Liva vit bert av vana, ella eitt lív, ið er fylt við stríði og strevi, kunnu vit gloyma at vera opin. Somuleiðis tá vit eru miðsøkin, og bert hava eitt ávíst áhugamál ella egnan tørv fyri eyga.

Vit kunnu eisini liva við øllum sansum, har vit ikki halda okkum aftur, ikki eru líkasæl og uttan at vita tað, beinleiðis opin fyri heiminum. Opna sansingin kann vera merkt av sjálvgloymsku, ið er eitt ideal innan lívsheimspekina. Soleiðis at vera til staðar, at vit uppliva og sansa uppá ein upptiknan og sjálvgloymandi hátt. Í vananum er tað mesta av handahógvi merkt, og vit loka, við lítlum áhuga, tað mesta útum okkara sansir. Tá vit eru mál- og miðsøkin eru bert tey brøgd við umheiminum áhugaverd, ið beinleiðis tæna okkara endamálum, og vit gerast hálvhjartað og hugur okkara syndraður. Hetta er ikki tað sama, sum tá vit uppliva, at okkurt tekur allan okkara huga, fyllir hugaheimin, tí her eru vit mangan ikki beinleiðis harrar yvir okkara áhugamálum. Vit vera førd, togað við og missa tamarhaldið á okkum sjálvum. Gongur alt væl 'hvørva' vit fyri okkum sjálvum, tí vit eru fullkomiliga upptikin av onkrum øðrum enn okkum sjálvum. Ofta møta vit hesum í skaldskapi, at persónarnir eru kloyvdir ímillum sjálvgloymsku og sjálvseygleiðan, sum t.d. í “Gosta Berlings saga”eftir Selmu Lagerlof, har vit møta persóninum Marianne, ið er tvíbýtt ímillum sína trá og sjálvseygleiðan. Seinni sigur frásøgufólkið í skaldsøguni, at hesin døkki máttur:”... situr inni í myrkastu krókunum í sálini og pilkar sálina í slintrur”. Soleiðis er tað eisini í ævintýrinum: “Snedronningen” eftir H.C. Andersen, har Kay fær trøllasplintur í eygað, ið fær hann at síggja heimin gjøgnumskoðandi og við kulda, har:*“..alt gott og vakurt svinnur til nærum einki”*. Soleiðis er ein ávís óneyðug skerjing og minking í sjálvseygleiðanini. Hesin máttur setur okkum uttanfyri og festir mangan líkasælu, háð, spott og vanvirðing fyri øllum góðum og óndum.

Eru vit opin uttan óneyðugar sjálvsatfinningar, kunnu vit uppliva rørslu og umskapan, ið bara soleiðis koma til okkum, kenslur okkara, tankar og sansir. Vit síggja okkurt nýtt í lívinum, og tankar og hugflog menna aðrar tankar. Soleiðis virkar hetta aftur á ein sjálvan, og ein gerst enn meiri opin. Soleiðis kemur tað blívandi undan kavi, ið er knýtt at dreymum og hugflogi okkara, ikki ynski- ella dagdreymar, men tað slag av hugflogi, ið danski heimspekingurin Løgstrup kallar virkin samanseting av okkara dreymum. Meiri tápuligir lívsfilosoffar sum m.a. Schopenhauer meina, at okkara trá og ynski bert stava frá einum lágum støði, meðan uppgávulyndi er tað hægsta. Hetta fær Nietzsche at halda, at sjálvsveruleikagerð er einki aftur ímóti tí at vinna á sjálvum sær, ið víðari førdi hann til at tankarnar um tað appoloninska (varðveitandi) og tí dionysiska (stremban, søkjandi og skapandi). Hjá Nietzsche er umráðandi at geva tí dionysiska pláss. Franski Bergson hevði eina umfatandi lívsáskoðan, har alt lív hevur eina uppkomu í *elan vital*, ið er ein ævig framalandi trá, ið strembar uppeftir, úteftir, víðari í bardaga ímóti náttúruni og tí striltni, ið er í lívinum. Innan modernaða eksistensheimspeki er aðaltankin, at menniskja sjálvt skal standa fyri egnari tilveru, tí lívið og tilveran koma ikki bert til ein av sjálvum sær, ei heldur sum úrslit av innari ella uttari ávirkan. Menniskja má fyrihalda seg til egnar møguleikar og ávirkan uttanifrá. Eksistensheimspekin fastheldur menniskjans frælsi, og at vit eru fjarstødd frá heiminum. Hjá Heidegger fær henda hugsan fótafesti, at ting og menniskja eru so ymisk, at menniskja má fata ting sum fremmand. Soleiðis er ein erligur og veruligur, er heimurin, um vit fyrihalda okkum til hann, óheimligur (unheimlich), ið aftur leiðir okkum til óttan, ið er orsøkin til tann dám, ið eyðkennir tað eginliga. Modernaða lívsheimspekin, tað vil siga eksistensheimspeki roynir at taka avleiðingarnar av modernitetinum, óttanum og guðloysi, í einum heimi, ið er upployst og bert hevur tað meining, ið vit sjálv áseta.

# Málbitin

**Háfloygt**

"Skagens Avis" rósar Anniku Hoydal upp um skýggja, visti eitt blað at siga frá. Her eru tvey blandað saman: "upp til skýggja" og "upp um skýggini". Um kann aldri stýra hvørsfalli!

**Kjak - ikki "tjak"**

Fleiri bløð stava hetta orð skeivt, skriva "tjak", sum onga grund hevur undir sær, tí ongastaðni verður hetta orð sagt við [tj], sum t.d. tjógv og tjaldur. Rætta stavingin er kjak.

**Dagrøkt - dagstovnar, avreiða o.tíl.**

Sigið [dag-] og ikki [dea-] í hesum orðum og øðrum við sama fyrra liði.
Sigið eisini avreiða [au-] og ikki [eav-] og kavbátur [kau-], ikki [keav-].

**Tjald og hjól**

Tey, ið bera tíðindi, annaðhvørt tað er í loftmiðlum ella bløðum, ráða fyri, hvønn veg málið hjá almenningi fer. Siga og skriva tey t.d. "telt" og "hjul", ja, so verður tað so hjá fólki flestum. Siga og skriva tey harafturímóti tjald og hjól, munnu hesi orð hava betri møguleika at koma fyri seg, sum frá líður, eisini í talaðum máli.

**Byggjarí (da. byggeri)**

er mishátt orð og skuldi verið óneyðugt í føroyskum. Vit hava t.d. orðið bygging, ella eisini húsabygging.

*Úr Orðafari nr. 3, 1987*

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Rúnar Reistrup, Aarhus, runar@reistrup.com
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

# Rættið eina vinarhond

Danmark og Føroyar eru aftur komin á bylgjulongd. Løgmaður og danski forsætisráðharrin kunnu nú tosa saman í allari fordragiligheit, og sjálvt landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum og danski forsætisráðharrin ganga hond í hond og klappa hvørjum øðrum á ryggin. Soleiðis sá tað út, tá Anders Fogh Rasmussen støkk inn á gólvið í Føroyum í vikuni, og soleiðis umtalaðu bæði Rasmussen og Kallsberg støðuna í donskum miðlunum.

Her er vend opinbart komin í, og tað kann man sum føroyingur bara frøast um. Tí hvat kann man annað ynskja enn góð og virðilig viðurskifti millum fólk og lond í hesum heiminum. Men tað sum skjótt kann leggja ein dempara á frøina er spurningurin um, hvat í veruleikanum hevur ført til tær hørðu konfrontatiónirnar, sum verið hava millum londini bæði seinastu try árini.

Eitt stutt afturlit gevur onga ábending um, hvat hevur leitt til knappligu broytingina í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark.

Politiska støðan hjá breiða meirilutanum á Fólkatingi mótvegis Føroyum er ikki broytt ein tumma, og nýggi danski forsætisráðharrin hevur lagt seg eftir at føra Føroyapolitikkin hjá undanfarnu stjórn víðari.

Støðan hjá meirilutanum á Løgtingi hevur kanska broytt sjónarhátt frá stuttskygdum til langskygt, men politiska støðan er óbroytt.

Men fyri hálvum ári síðan bar einki til. Nú ber alt til. Hvussu ber tað til?

Eftir øllum at døma er virðingin millum partarnar tað einasta, sum er broytt.

Sum føroyingur búsitandi í Danmark havi eg ofta kent eina trongd til at umbera, Føroya fólks vegna, ta vantandi virðing fyri donsku starvsfeløgunum, sum føroyska landsstýrið møtti upp við til samráðingarnar herniðri.

Og í sama viðfangi havi eg sum føroyingur í Danmark ofta kent meg traðkaðan á av tí respektleysa tóna, sum danskir politikarar og fjølmiðlar hava brúkt í umtaluni av føroysku ynskjunum um sjálvstýri. Hetta sleppa eg og allir hinir landsmenninir her í Danmark vónandi undan í framtíðini.

Tað, ið Anders Fogh Rasmussen sum nýtt blóð í sambandinum millum Føroyar og Danmark hevur ført við sær, er ein vilji til at gloyma fortíðar samanbrestir og aftur virða føroyingar.

Við at vísa føroyskum politikarum virðing og ásanna, at danska virðingin fyri føroyingum í seinastuni hevur verið lítil, hevur danski forsætisráðharrin rætt eina vinarhond. Hann fekk skjótt eina afturímóti.

Tað, sum føroysku politikararnir tó ikki síggja út til at hava fatað, var, at Anders Fogh við hesum eisini valdi at gloyma ta vánaligu virðing, sum føroyingar hava víst dønum hesi seinastu árini. Og tá Anders Fogh segði “Nu skal vi have en ordentlig og respektfuld dialog mellem Færøerne og Danmark” fataðu føroyskir politikarar tað sum eina staðfesting av, at nú broytti danski forsætisráðharrin kós og gekk føroyskum ynskjum á møti.

Tað sum Anders Fogh tó allarhelst meinti var, at nú er tíðin komin til at føroyingar eisini fara at sýna dønum størri virðing.

Vónandi fer hesin boðskapurin í framtíðini at verða tulkaður sum ein áheitan heldur enn sum ein eftirgeving frá danskari síðu, tí annars kann nýggja støðan skjótt fara at líkjast teirri gomlu aftur.

Og tað er nú einaferð lættari at banka uppá og lata hurðina upp enn at blása hana inn. Tað mugu føroyingar hava ásannað eftir blásiroyndirnar her niðri seinastu fýra árini.

ítróttur

Nr. 13 • leygardagur • 19. januar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hull er undir trýsti

**Seinastu dystirnar hevur ikki gingið nakað serligt, og nú kenna vit trýst á okkum, heldur Julian Johnsson um støðuna hjá Hull City, har leiðslan millum annað hevur gjørt av at seta vaktarmenn við bilarnar hjá leikarunum**

ONGLAND
*Jákup Mørk*

Boðini úr havnarbýnum, Hull, í Onglandi vóru greið, tá fótbóltsliðið í býnum fyrireikaði seg til inniverandi kappingarár.

Við keypi av millum øðrum Julian Johnsson og setanini av Brian Little sum venjara, setti nýggi stjórin, Adam Pearson, kós móti hægri tindum. Liðið, sum í løtuni er í fjórð bestu ensku deildini skuldi snøgt sagt finna sítt pláss longur uppi, og uppflytan í aðru deild var fremsta málið.

### Skulu vinna

At byrja við tóktist eisini at ganga sum eftir ánni, og tó at kappingin í oddinum var hørð, so helt Hull seg alla tíðina framat, og lógu teir millum annað eitt langt skifti á øðrum plássi í deildini.

Seinasti mánaðin hevur kósin tó verið ein heilt onnur. Í løtuni siga hagtølini, at Hull ikki hevur vunnið í sjey dystum á rað, og fýra teir seinastu eru taptir, og nú er av álvara farið at sansa at.

- Tað eru framvegis 60 stig eftir at spæla um, so har er einki sum helst avgjørt, men tað er klárt, at vit skjótt skulu i gongd við at vinna nakrar dystir. Leygardagin skulu vit spæla á heimavølli móti Exeter, sum er miðskeiðis á stigatalvuni, og tann dystin skulu vit altso vinna, um vit framhaldandi skulu halda stutt tjóður í triðja plássinum, sum eisin ber beinleiðis uppflytan við sær. Luton og Plymouth, sum eru í oddinum, verða í øllum førum sera tung at basa.




*- Seinasta dystin, sum vit spældu, var tað í øllum førum ikki serliga stuttligt. Longu í hálvleikinum byrjaðu áskoðararnir at rópa eftir okkum, og av trygdarávum hevði leiðslan í felagnum eisini sett vaktarmenn, har bilarnir hjá leikarunum standa parkeraðir, sigur Julian millum annað um trongstøðuna, sum Hull í løtuni er í*

### Leiðslan sett vaktarfólk

Spurdur, um leikararnir annars hava kent nakað trýst á sær, nú gongdin ikki hevur verið so hugalig, sigur Julian, at tað hevur ikki verið heilt sørt.

- Seinasta dystin, sum vit spældu, var tað í øllum førum ikki serliga stuttligt. Longu í hálvleikinum byrjaðu áskoðararnir at rópa eftir okkum, og av trygdarávum hevði leiðslan í felagnum eisini sett vaktarmenn, har bilarnir hjá leikarunum standa parkeraðir, men eg vil tó ikki siga, at vit kenna okkum hóttar kortini.

- Talan er eisini um nógvar rættiliga ungar og óroyndar leikarar, og hesir kenna kanska meira trýst á sær, enn um talan var um leikarar við nógvum yrkisroyndum, heldur Julian, sum við sínum 26 árum telist millum teir meira royndu á liðnum.

Ein av persónunum, sum sjálvandi fær sín part av skuldini, er venjarin hjá Hull, Brian Little. Hann hevur annars roynt eitt sindur av hvørjum, og hevur millum annað vant stórfelagið, Aston Villa, men hóast hesar royndir, so tykist Julian eisini hava varhugan av, at venjarin kennir trýst á sær.

- Eg haldi í øllum førum, at hann hevur framt onkur mistøk. Ikki minst tað, at hann í seinastuni hevur skifti so nógv út í hópinum. Til hvønn dyst eru einir fýra til fimm leikarar skiftir, og so er tað sjálvsagt, at tað er ringt at finna nakra rútmu í liðnum.

- Eisini haldi eg, at leikarakeypini eru dekan ov nógv í tali. Hetta órógvar eisini rútmuna, og nú hópurin er komin upp á einar 30 mans, so kunnu allir ikki vera eins væl nøgdir. Sjálvandi skal hópurin vera breiður, men eg kann ikki fyristilla mær, at tørvur skal vera á 30 leikarum, og hjá teimum, sum standa aftarliga í røðini, er tað tí lítið eggjandi bara at koma til venjingar og spæla við eykaliðnum.

### Gingið væl

Hóast tað soleiðis ikki er nakar dansur á rósum í løtuni hjá Julian, so tykist miðvallarstríðsmaðurin at trívast væl við yrkistilveruni í Onglandi.

- Eg kann ikki siga annað enn, at hetta fyrsta árið hevur gingið nógv betri enn væntað.

- Tá eg kom higar, roknaði eg ikki við, at eg alt fyri eitt skuldi fáa ein týðandi leiklut á liðnum. Ikki minst varð roknað við, at eg skuldi stríðast við Theo Whitmore um eitt pláss á miðvøllinum, men ístaðin eru tað fyri tað mesta vit báðir, sum hava mannað miðvøllin, og tað hevur riggað fínt okkara millum. Hann er kanska ikki leikarin, sum vinnur teir flestu bóltarnar, men hann er sera góður tekniskt, og so kann eg liggja aftan fyri og rudda upp, soleiðis sum eg eri vanur við, heldur Julian.

- Verður sæð burtur frá teirri vikuni, tá eg lá sjúkur, so eri eg byrjaður inni í øllum dystunum, og bert skiftur út nakrar heilt fáar ferðir, so eg kann ikki siga annað enn, at eg persónliga eri væl nøgdur. Eg havi tó alla tíðina vita, at ein niðurtúrur fór at koma, og so má eg bara stríðast enn meira. Tað eru hvørja ferð fimtan mans, sum sita heilt uttanfyri, klári eg at vera í hópinum, so er tað eisini gott.

Spurdur, um hesin niðurtúrurin nú er um gera um seg, er Julian eitt sindur ivandi.

- Í løtuni kenni eg meg kanska eitt sindur trýstan. Felagið hevur júst keypt Richard Sneekes. Ein hollending, sum áður hevur leikt við Bolton og West Bromwich Albion. Hóast hann ikki er heilt ungur longur, so er hetta tó ein leikari, sum felagið hevur ætlanir við, og tí kann hugsast, at hetta fer at raka meg, men tað fáa vit so at síggja, sigur Julian, áðrenn vit at enda ynskja honum góða eydnu við komandi dystunum.

# Byrial útlæntur

Heimasíðan hjá OB, ww.ob.dk, skrivaði hósdagin, at OB og Fredericia eru komin ásamt um, at føroyski landsliðsleikarin, Johan Byrial Hansen, komandi hálva árið skal spæla við Fredericia.

Síðani Johan fyri hálvum øðrum ári síðani kom til OB, hevur talan bert verið um átta dystir á besta liðnum, og í longdini er hetta sjálvsagt ikki ein nøktandi støða.

Enn er sáttmálin ikki skrivaður undir, men í OB verður sagt, at hetta verður gjørt ein av komandi døgunum.

Fredericia er í løtuni á 13. plássi í næst bestu donsku deildini.

**-jm**